Arbeiðið at byggja nýggju Norrönu heldur nú fram

Á alfundinum hósdagin kundi nevndin í Smyril Line staðfesta, at royndin at hækka eginpeningin tær 125 milliónirnar, sum týska skipasmiðjan kravdi, er eydnast

MILLUMLANDA-SIGLING
Áki Bertholdsen

Tað er nú at kalla púra greitt, at arbeiðið at byggja nýggju Norrøna kann halda fram. Og tað er somuleiðis greitt, at skipið verður latið Smyril Line tann 20 mars í 2003, sum ætlað, visti Útvarp Føroya at siga beint eftir aðalfundin í smyril Line hósdagin.

Á aðalfundinum staðfesti nevndin, at arbeiðið at útvega tær 125 milliónirnar afturat í eginpeningi, sum týska skipasmiðjan kravdi, er eydnast.

Sostatt er eginpeningurin og eginognin nú meiri enn 200 miljónir kr.

Annars hevur tað ikki gingið væl at fáa tær kravdu 125 milliónirnar til vega, serliga eftir at landið ikki vildi taka lut í ætlanini.

Men so setti fyrst ein íslendskur grunnur 10 miljónir í Smyril Line og honum á baki settu hetlendingar aðrar 50 miljónir afturat í felagið.

Hinar 65 milliónirnar, sum nú restaðu í, hava føroyskir íleggjarar sett í Smyril Line.

Alivirkið Vestlax setti seg fyri 15 milliónir og aðrir íleggjarar fyri fimm milliónir.

Og fyrr í vikuni fekk Smyril Line at vita frá Framtaksgrunninum, at hann var sinnaður at seta 25 miljónir kr. í felagið, eftir at nakrar kanningar aftrat verða gjørdar.

Og á sjálvum aðalfundinum boðaði Tryggingarfelagið Føroyar frá, at nevndin hevði gjørt av at seta 15 miljónir krónur í Smyril Line, samstundis sum aðrir føroyskir íleggjarar settu 5 miljónir í felagið.

Sostatt hevur Smyril Line fingið tilsøgn um allar tær 125 miljónirnar sum skuldu teknast

afturat, og nú er at kalla púra vist, at arbeiðið uppá nýggja skipið heldur fram, segði Útvarpið hóskvøldið.

Í nevndini í Smyril Line eru Jónas Hallgrimsson, formaður, Óli Hammer, Thomas Arabo, Jógvan í Dávastovu, Heri Mørkøre, Einar Waag og hetlendingurin Morgan Goodlad.

Tað hevur staðið nógv á leiðsluni á Smyril Line seinastu tíðina, men nú gongur betur. Á aðalfundinum hósdagin kundi nevndarformaðurin, Jónas Hallgrimsson fortelja fundarfólkinum, at tað hevur eydnast at útvega kravda eginpeningin. Óli Hammer, stjóri, kannar tølini

Mugu fáa eitt skip sum lyftir Suðuroy fram í tíðina

– Tað kemur alt ov ofta fyri, at tað verður hugsað ov nógv um at spara nakrar fáar krónur tá ið íløgur skulu gerast, heldur enn at brúka tann pening, sum skal til, fyri at vinna tað aftur í betri rakstri og betri tænastu, sigur Bogi Mortensen, formaður í Økismenningarnevndini

SUÐUROYAR-SIGLINGIN OG ØKISMENNING
Áki Bertholdsen

At koma við einum nýggjum Suðuroyarskipi, sum ikki er annað enn Smyril, sum nú er, bara í eini nýggjari útgávu, ereitt stórt aftur stig fyri Suðuroynna, sigur Bogi Mortensen, formaður í Økismenningarnevndini

– Tað er avgerðandi neyðugt, at tað nýggja suðuroyarskipið verður eitt framstig fyri Suðuroynna. At koma við einum skipi, sum líkist Smyrli, sum nú er, bara í eini betri útgávu, verður eitt stórt aftur stig fyri Suðuroynna.

Tað sigur Bogi Mortensen, vinnulívsmaður í Suðuroynni. Men umframt at vera vinnulívsmaður, er hann eisini formaður í Økismenningarnevndini, sum Landsstýrið setti nakað síðani at kanna eftir, hvussu tað nýggja suðuroyarskipið skal verða, hava vit spurt formannin í Økismenningarnevndini, hvørji krøv, hann heldur, at tað nýggja skipið skal lúka, útfrá einum økismenningarligum sjónarmiði.

Kapasitetur og títtleiki

Bogi Mortensen staðfestir, at tá ið landsstýrið nú fer at taka avgerð um nýggja Smyril, verður tað ein avgerð, sum fær ómetaligan, fyri ikki at siga altavgerandi, týdning fyri Suðuroynna.

Hann sigur, at tað, sum hevur avgerandi týdning fyri Suðuroynna, er, at kapasiteturin og títtleikin er á nóg høgum støði.

– Út frá einum økismenningarligum sjónarmiði er títtlekkin og kapasiteturin í ferðasambandinum altavgerandi.

Bogi Mortensen sigur, at hvat Suðuroynni viðvíkur, eru hesi viðurskiftini eru ikki nøktandi, sum er.

– At skipið siglur so sjáldan, sum tað ger, skapar eisini ein kapasitettrupuldleika.

Hann skoytir uppí, at sum er, noyðast suðuroyingar í ein mun at leggja fiskarbeiðið á landi til rættis eftir ferðaætlanini hjá Smyrli, heldur enn eftir, hvat hevði loyst seg best vinnuliga. Hetta eru viðurskifti, sum tað ikki er neyðugt at hugsa um aðrastaðni í landinum. Eitt nú skal fiskur flytast suður av uppboðssøluni og partvís skulu eisini slógvbingjur flytast suður og tað gongur ikki altíð eftir vild, tí at kapasiteturin er ov lí til.

– Eitt nú er tað ógvuliga trupult hjá virkjum í Suðuroynni at keypa fisk á uppboðdsølu, ella av landingarmiðstød seinnapartar, og fáa hann suður sama dag. Vandi er fyri, at hann ikki fæst suður, fyrrenn kvøldið eftir, tvs, at tað ber ikki til at virka hann, fyrrenn annan dagin eftir, at hann er keyptur, og tað er ikki nøktandi.

Hevði skipið hinvegin siglt oftari, hevði tað loyst tann trupulleikan.

Men Bogi Mortensen sigur eisini, at tað er heilt avgerandi fyri at menna vinnulívið í Suðuroynni og fyri menningin av oynni, sum heild, at samband er oftari við meginøkið.

Hinvegin hevur hann ikki gjørt sær metingar um, hvussu stórur títtleikin skal vera, ella, hvat tað krevur av íløgum.

–Tað einasta, vit hava gjørt í økismenningarálitinum, er at staðfesta nøkur viðurskifti, sum hava týdning fyri at menna økini.

Títtlekin hevur ikki bara týdning fyri vinnuna, hann hevur eisini avgerandi týdning fyri trivnaðin og menningina í oynni.

– Tað skapar ikki trivna, at tað mangan kostar 15-16 tímar hjá einum suðuroyingi at gera eini ørindi í Havn.

– Men hetta gongur eisini báðar vegir. Tað er eisini sera trupult hjá fólki norðanfjørðs at gera ørindi í Suðuroy. Tað kostar sum oftast eisini eina gisting og tað er heldur ikki nøktandi.

At ferðasambandið er so vánaligt, ger tað eisini sera trupult hjá vinnulívinum í Suðuroynni at kappast við vinnuna í restini av landinum um arbeiði aðrastaðni í Føroyum, enn í Suðuroynni.

– Fyri ferðavinnuna í Suðuroynni hevur tað eisini stóran týdning, at ferðasambandið er gott. Tað hava vit fordømi um. Vit sóu týdningin av tí tað árið, Norrøna sigldi fyri Smyril, ímeðan hann var í dokk. Tá vaks ferðafólkatalið munandi.

– Avleiðingarnar av einum vánaligum sambandi sóu vit hinvegin í fjør, tá ið Claymore sigldi, tí tá fall ferðafólkatalið á Suðuroyarleiðini munandi, og fleiri ferðir vórðu stór tiltøk í Suðuroynni avlýst. Orøskin til hetta var, at tá ið Norrøna sigldi, var talan um eina skjótari og betri ferð. Men tá ið Claymore sigldi, var talan um eina longri og verri ferð.

Bogi Mortensen sigur, at tað er onki at ivast í, at batnar ferðasambandið, førir tað eisini eitt ferðslulop við sær.

Má sigla skjótari

Bogi Mortensen leggur tí dent á, at nú nýtt suðuroyarskip skal útvegast, er tað heilt avgerðandi, at talan verður um eitt skip, sum veruliga lyftir ferðasambandi upp á eitt annað støði, og sum flytir Suðuroynna fram í tíðina.

– Smyril, sum er, kann sigla 19 míl. Er tað so nakað framstig at koma við einum nýggjum skipi, sum eisini siglur 19 míl?

– Nei, at koma við eitt sama slag skip, sum Smyril, ið nú er, bara í einum nýggjari útgávu, gevur slett onga meining. Tað skal ein betri loysn til fyri at skapa menning og trivna í Suðuroynni.

Eftir tí, sum er komið fram, er munurin á skipunum, sum sigla 19 míl og tí, sum siglur 21 míl, einar 25-30 milliónir krónur?

– Tá ið nakað skal gerast, kemur tað alt ov ofta fyri, at hugsað verður ov nógv um at spara nakrar fáar krónur í sjálvari íløguni, heldur enn at brúka tann pening, sum skal til, fyri at fáa eina betri tænastu og ein betri rakstri. At tosa um um 25-30 milliónir í eini íløgu, sum skal vara í 25-30 ár, er burturvið. Tá ið vit tosa um so so stórar upphæddir, sum tað her undir øllum umstøðum verður talan um, og tá ið vit tosa um eina íløgu, sum skal vara í so langa tíð, sum hendan, er tað heilt burturvið at hyggja so neyvt eftir sjálvum íløgukostnaðinum, sigur Bogi Mortensen.

Frystilínubátar rigga ikki undir Føroyum

-Tú fær ikki ein tann einasta fiskimann at liggja undir Føroyum í hálvan ánnan mánað og hyggja upp á land. Ørvísi er um mann er ordiliga burtur, eitt nú í New Foundlandi, sigur Virgar Hentze, skipari á Eysturoyingi.

LÍNUVEIÐA
Justinus Leivsson
Eidesgaard

Felagið Farek hevur gjørt eina kanning, sum saman ber útslitið hjá teimum ymisku skipabókunum í Noregi, Íslandi og Føroyum. Í eini útvarpssending fyrr í vikuni við Helga Jacobsen sum verti, kom fram, at fíggjarliga avkastið hjá teimum stóru føroysku línubátunum var vánaligt og at eitt norskir línubátar fingu meira pening burtur úr teirra veiður.

Høvuðsmunurin millum føroyskar og norskar línubátar er, at norðmenn so at siga bara frysta umborð, meðan føroyskir línubátar ísa fiskin. Hetta merkir, at longu tá fyrsti sterturin hjá einum føroyskum línubáti kemur á dekkið, so er eisini avgjørt, nær túrurin endar og so má túrurin laga seg eftir veðri og streymi í størri mun, enn um tú við einum frystibáti kann liggja úti í longri tíð og tí kann útnytta tíðina nógv betri.

Hvat siga føroyskir línumenn til hetta. Skiparin á Eysturoyingin, Virgar Hentze kundi sjálvsagt hugsað sær ein spildurnýggjan frystilínubát, men hann ivast stórliga í, um hann honum hevði eydnast at fingið fólk til at reka hendan bát, við longum túrum undir Føroyum.

-Eg trúgvi ikki, at vit høvdu fingið ein tann einasta við, um vit skuldu ligið úti undir Føroyum í hálvan annað mánað og gløtt upp á land. Tað ber bara ikki til. Føroyingar hava roynt hetta og tað er ringt at fáa fólk.

Men sjálvandi kundu vit havt frystibátar og so farið inn av og á uttan at leggja veiðuna upp. Tað hevði kanska verið ein fyrimunur, sigur Virgar Hentze.

Hann heldur eisini, at tað er ein góð forkláring upp á at norðmenn og íslendingar hava so góðar línubárat.

-Fyri fáum árum síðan høvdu vit fleiri nýbygdar línubátar við frystilast í føroyska flotanum. Hvar eru teir í dag? Vit forerdu teir til norðmenn og íslendingar í kreppuni, ístaðin fyri gera tað møguligt hjá teimum at vera í flotanum, sigur Virgar Hentze.

Føroyskir línubátar góðar íslandstúrar

LÍNUVEIÐA
Justinus Leivsson
Eidesgaard

Eysturoyingur gjørdi ein fínan túr undir Íslandi, Hann landaði hósdagin og er nú farin avstað aftur, antin undir Føroyum ella til Íslands, skiparin hevði ikki tikið støðu til hetta seint seinnapartin í gjár.

Vit tosaðu við skiparan, Virgar Hentze av Eiði í telefonini hósdagin seinnapart, meðan ísurin fór skramblandi niður í lastina.

-Jú, fiskiskapurin hendan túrin var heilt í lagi. Vit settu seks og eina hálva setu og fingu 100.000 pund. Vit royndu í Breiðmerkardýpinum við Ingolfshøfn. Vit skundaðu okkum yvir nú, tí seinni er so nógvur toskur har á leiðini, at tað kann verða ringt at halda seg innan ásetingina í hvussu nógv ein skal hava av hvørjum,sigur Virgar Hentse.

Eysturoyingur eigur eina kvotu upp á 200 tons í íslendskum sjógi og við fyrsta túrinum hava teir veitt ein fjórðing.

-Vit plaga at fordeila túrarnar yvir árið, alt eftir hvussu fiskitíðin er og hvussu tað annars liggur fyri heima í Føroyum. Tað er ongantíð trupulleikar at fiska íslandskvotuna upp, men tað kann vera eitt sindur torført við lutfallinum millum tosk og hjáveiðu. Tað kann vera ringt at fiska og samstundis ansa eftir ikki at fáa ov nógv at toski. Tað má ikki vera meira enn 22 prosent av toski í lastini, sigur Virgar Hentze.

Umframt Eysturoying vóru tvey onnur føroysk skip undir Íslandi seinasta túr. Tey vóru Sigmundur og Vestfreezer.

AP Møller biður fólk

Í samband við at AP Møller fer undir eina nýggja rað av nýbygningum, kemur fólk frá reiðarínum til Føroya at leita eftir fólki í komnandi viku

Í tíðindaskrivi frá AP Møller verður sagt, at teir verða á Hotel Hafnia týdagin, mikudagin og hósdagin í komandi viku og vilja hitta fólk, sum kundu hugsað sær at sloppið við skipum teirra.

Talan er um yvirmenn, navigatørar og maskinmenn, sum AP Møller hevur størv til í hesum umfarinum.

Krøvini til navigatørarnar eru í minsta lagi STCW CoC II/1 umframt at teir skulu hava royndir í handilsflotanum.

Til maskinmenninar verða sett tey krøv, at teir hava í minsta lagi STCW CoC III/1 (STCW95).

Áhugaðir kunnu venda sær til leiðaran ella yvirtænaran á Hotel Hafnia týsdagin, mikudagin og hósdagin í komandi viku millum klokkan 8 og 12 og millum klokkan 13 og 17.

Gjørt verður vart við, at tað helst bert verður tíð at tosa við einar seks-sjey mans um dagin, verður sagt í tíðindaskrivinum frá AP Møller.

ej

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK
Skrás.: 20-06-95
Km.: 81.000
Prísur: 149.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN
Skrás.: 06-08-90
Km.: 229.000
Prísur: 38.600,-

TOYOTA CAMRY 2,0 GLI (Sýnaður 10-00)
Skrás.: 10-07-91
Km.: 129.000
Prísur: 62.600,-

HONDA ACCORD 2,0 LS
Skrás.: 18-06-97
Km.: 113.000
Prísur: 135.600,- Garanti*

TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL
Skrás.: 26-03-98
Km.: 42.000
Prísur: 149.600,- Garanti*

DAIHATSU SIRION 5 H AUTOM.
Skrás.: 30-06-99
Km.: 22.000
Prísur: 112.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 L/B
Skrás.: 28-03-89
Km.: 165.000
Prísur: 53.600,- Garanti*

CITROEN XANTIA
Skrás.: 17-05-96
Km.: 66.000
Prísur: 89.600,-

TOYOTA COROLLA 1,4 SEDAN
Skrás.: 14-04-00
Km.: 27.000
Prísur: 142.600,- Garanti**

SKODA FELICIA
Skrás.: 30-09-96
Km.: 70.000
Prísur: 53.600,-

TOYOTA CARINA E 1,6 GXI L/B (Sýnaður 04-00)
Skrás.: 09-11-95
Km.: 87.000
Prísur: 107.600,- Garanti*

FIAT CINQUECENTO 170
Skrás.: 19-08-97
Km.: 42.000
Prísur: 49.600,-

TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN (Sýnaður 03-00)
Skrás.: 30-05-94
Km.: 109.000
Prísur: 89.600,- Garanti*

VOLVO 460 SEDAN (Sýnaður 06-99)
Skrás.: 25-05-90
Km.: 92.000
Prísur: 48.600,-

TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL
Skrás.: 28-10-97
Km.: 84.000
Prísur: 127.600,- Garanti*

OPEL ASTRA 1,6 I STW.
Skrás.: 03-11-97
Km.: 35.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,9 DIESEL STW.
Skrás.: 20-07-00
Km.: 11.000
Prísur: 164.600,- Garanti**

HYUANDAI ACCENT 1,5
Skrás.: 02-01-98
Km.: 25.000
Prísur: 74.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B
Skrás.: 25-01-99
Km.: 28.000
Prísur: 112.600,- Garanti**

CITROEN XANTIA DIESEL (Sýnaður 03-01)
Skrás.: 01-06-95
Km.: 266.000
Prísur: 69.600,-

TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA H/B
Skrás.: 15-03-99
Km.: 45.000
Prísur: 107.600,- Garanti**

FORD ESCORT 1,8 DIESEL (Sýnaður 01-01)
Skrás.: 16-08-91
Km.: 134.000
Prísur: 35.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B AUTOM. (Sýnaður 03-01)
Skrás.: 21-07-97
Km.: 38.000
Prísur: 105.600,- Garanti*

MAZDA 323
Skrás.: 06-02-97
Km.: 85.000
Prísur: 82.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA H/B (Sýnaður 11-00)
Skrás.: 30-08-95
Km.: 74.000
Prísur: 75.600,- Garanti*

DAEWOO NEXIA 3 HURDAR
Skrás.: 13-11-97
Km.: 53.000
Prísur: 48.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B
Skrás.: 30-09-98
Km.: 52.000
Prísur: 115.600,- Garanti**

FORD ESCORT 1,6
Skrás.: 07-03-00
Km.: 19.000
Prísur: 125.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99
Km.: 7.000
Prísur: 114.600,-Garanti**

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við

STØKK INN Á GÓLVIÐ
www.reyniservice.fo
REYNI SERVICE
Opið: Mán.-fri. 8.00-17.00
Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040